

## Bankar fáa hjálp

Tað stóra virðisfallið á íslendsku krónuni herfyri fekk fólk at stúra fyri støðuni hjá teimum íslendsku bankunum, og spurt varð, um stjórnin er sinnað at tryggja bankarnar. Berlingske Tidende hevur sett Ingibjörg Sólrún Gísladóttir, uttanríkisráðharra hendan spurning, og svarið er, at stjórnin fer at hjálpa øllum íslendskum bankum, sum kunnu fáa tørv á hjálp. Sjálv er hon sinnað at veita bankunum stuðul beinleiðis úr ríkiskassanum.

# - nú í Føroyum

sum er donskt gift og búsitandi í Danmark.

Hugsjónin handan Petø læringina er, at um børnini læra at vilja og at trúgva at tey kunnu, so eru menningarmøguleikarnar stórir.

- Tað er týdningarmikið, at børnini skilja, at eg kann og eg vil. Vit, sum eru um tey, skulu vísa teimum, men ikki hjálpa teimum og taka synd í teimum. Tað kunnu tey ikki brúka til nakað, sigur Anna Maria Anthoniussen, sum er í holt við at útbúgva seg til Petø instruktør.

Andrea Udvardy Sabroe sigur, at Petø byggir á eina heildarfatan av barninium, har dentur verður lagdur á læring heldur enn venjing.

- Vit leggja als ikki dent á trupulleikan, men hyggja eftir tí heila menniskjanum og tað potentiali, sum tað hevur, greiðir Andrea Udvardy Sabroe frá.

Hon sær stórar fyrimunir í at hava ein føroyskan Petø stovn, tí í dag brúka myndugleikarnir nógvar pengar at senda børn uttanlands til hesa viðgerð. Og verður tilboðið tøkt í Føroyum, høvdu enn fleiri gjørt nýtslu av tí.

### Sangur og spæl

Í einum lítlum venjingarhøli á Klaksvíkar Sjúkrahúsi hava 14 børn seinastu tvær vikurnar fingið intensiva kropsliga venjing. Um morgunin eru børn undir skúlaaldur og seinnapartin børn í skúlaaldri. Eitt foreldur ella stuðul er inni við til venjing, meðan hini sita í einum øðrum rúmi og fylgja við í sjónvarpi.

Og venjingin líkist spæli. Andrea Udvardy Sabroe dansar og syngur fyri børnunum, og tey sita við stórum smílum og bíða, um tað nú er teirra túrur at verða nomin við. Hon syngur um djórini í frumskóginum og nertur við børnini fyri at vekja teirra áhuga og gera tey klár til venjing. So at siga øll børnini eru við, og onkur situr í skellilátri alla tíðina.

Bæði Anna Maria Antoniussen og Andrea Udvard Sabroe eru væl nøgdar við tær fyrstu tvær vikurnar av skeiðnum.

- Skeiðið er sera intensivt, børnini venja tríggjar tímar hvønn dag í ein mánað, og fyri tey, sum ikki eru von við tað, kann tað tykjast eitt sindur ógvusligt. Men tað hevur gingið ótrúliga væl, og øll tykjast væl nøgd, sigur Anna Maria Antoniussen.

- Tað er nógv spæl og sangur, tí tað snýr seg um at motivera børnini til sjálvi at klára tingini. Og vit geva okkum góða tíð, tí børnini skulu merkja sínar egnu vøddar og merkja kroppin.

- Vit vænta nógv av børnunum, men vit seta ikki ómøgulig mál, sigur Andrea Udvary Sabroe. Tað snýr seg um at eggja og geva hug og mót.

### Greið visión

Anna Maria Anthoniussen arbeiðir sum leiðari á Dagstovninum í Hoyvík, men hevur tikið sær tveir mánaðar orlov til at fyriskipa, undirvísa og venja við børnunum í Klaksvík. Og hon vónar at hetta royndarskeiðið er byrjanin á eini tilgongd, sum kann enda við einum føroyskum Petø stovni.

- Síðani eg kom at kenna til Petøvenjingina í samband við, at eg var stuðul hjá gentu, sum fekk hesa venjing, havi eg altíð verið hugtikin av hugsjónini. Í 1999 var eg í Skotlandi við gentuni, sum eg var stuðul hjá, og síðani havi eg arbeitt við tí í fimm ár og tikið útbúgvinina sum Petø lærari.

Hetta er ein fýra ára útbúgving, og Anna Maria Anthoniussen manglar bara at skriva spesiali. Krøvini til hvør kann undirvísa og venja í Petø eru strong, og tí er ungarska Andrea Udvardy Sabroe eisini við.

- Dreymurin er, at vit kunnu seta á stovn ein Petø stovn í Føroyum, har børn kunnu fáa hjálp og stuðul til veruliga at menna seg, sigur Anna Maria Anthoniussen.

### Ikki sjúkraviðgerð

Tað eru ikki øll børn, sum fáa gagn av Petø. Venjingin er serliga ætlað børnum og ungum, har samskifti millum kropp og heila ikki virkar, sum tað skal. Tað vil siga, at børnini skulu hava vøddastyrki, men bara ikki duga at brúka hana ella stýra henni.

Anna Maria Antoniussen leggur dent á, at Petø fyrst og fremst eru læring, ikki venjing.

- Hóast vit venja nógv, so snýr tað seg fyrst og fremst um at læra barnið at tað kann brúka kroppin og læra heilan at stýra kroppinum.

Petø hugtakið er úr Ungarn, og har kallað tey tað ein pedagogik. Í Englandi, sum var undangonguland í Vestureuropa, kallað tey tað Conductive Education, leiðandi læring. Lærutilgongdin er í fokus, har einstaka barnið skal læra seg at skapa samband millum heila og vøddar.

Petø stovnar eru í Englandi, Svøríki og Noregi, og alla staðni verður samstarva við heilsuverki. Men stovnarnar eru ikki partar av sjúkrahúsverkinum.

- Hetta er ikki sjúkraviðgerð ella fysioterapi. Vit brúka kropsliga venjing saman við pedagogikki og læring, og tí er hetta meira enn ein sjúkraviðgerð, sigur Andrea Udvardy Sabroe.

Anna Maria Antoniussen sigur, at tað besta hevði verið, um ein føroyskur Petøstovnur lá atskildur frá heilsuverkinum.

- Vit kunnu samstarva og fleiri av børnunum brúka eisini heilsuverki regluliga, men tað besta hevði verið hølir, sum ikki lógu inni á einum sjúkrahúsi.

Professor András Petö varð føddur í Ungarn í 1893 og mennti í 1930unum Petølæruháttin. Í 1952 stovnsetti hann ungarska lærustovnin, The National Institute of Motor Therapy. Men av tí at Ungarn var avskorið frá vesturheiminum undir kalda krígnum náddi hesin venjingarháttur ikki okkara grannalond fyrr enn seinast í 1980unum.



*Julian er átta ár og býr í Havn. Hann hevur roynt Petø venjingar fyrr. Fimm ferðir hevur hann verið í Svøríki til uppvenjing. Julian hevur trupulleikar við javnvágini.*
*Mamman, Finnløg Kjær, sigur, at tey hava øgiliga góðar royndir við Petø. Julian hevði eisini niðursetta vøddastyrki, men hendan trupulleika hevur hann vunnið á. Nú er bara javnvágin eftir.*
*- Føroyska venjingin er minst líka góð sum tann svenska. Og seinastu fjúrtan dagarnir hava givið Julian ótrúliga nógv, tí venjingin hevur verið so intensiv. Hann tímir eisini ordiliga væl, tí hann merkir, at tað hjálpir.*
*Julian situr pinnastillur og lurtar, meðan Anna Maria Antoniussen greiðir frá. Hann ætlar sær ikki at missa nakað av tí, sum gongur fyri seg. Tá hann og Aron fáa serskilda venjing í øðrum rúmi, vilja teir hava mammurnar vekk. Hetta skulu teir klára sjálvir.*
*Mamma Julian, Finnløg Kjær, heldur, at tað er ein stórur fyrimunur, at venjingin fer fram í føroyskum umvhørvi.*
*- Tað er skjótt til, at mann fer skeivt av hvørjum øðrum, tá mann ikki heilt skilir hitt málið. Og børnini eru nógv tryggari, tá øll hini tosa sama mál sum tey.*



*Karla úr Runavík er fýra ár og spastisk í aðrari síðuni. Hon er eineggjaður tvíburður, men systur hennara hevur ongar kropsligar trupulleikar. Mamman, Andriása Sínunardóttir, sigur, at Karla ikki fær nakra venjing í gerandisdegnum, men um Petø venjingin var eitt fast tilboð í Føroyum, hevði hon avgjørt gjørt brúk av tí, tí Karla hevur fingið nógv burtur úr hesar báðar vikurnar*